Annika Dalsgaard: Ummæli av Kjarr á bókaframløgu í Norðurlandahúsinum

Kenslan av ikki at hoyra til. Tráanin eftir føstum rótum, men so allíkavæl ikki. Ein ungur flytifuglur, ið einsamallur er á eini ferð, ið helst eingin annar ungur føroyingur hevur verið á fyrr.

Lukka og stuttleiki, drívmegi sum eingin annar. Áhaldni, kærleiki, sorg og gleði. Ótti, óvissa og dirvi. Alt hetta verður flættað saman í spennandi nýggju bókini Kjarr eftir Rakel Helmsdal, ið snýr seg um Lauren, ið helst vil kallast Laura og er fyrst í tjúgunum.

Tá eg fekk bókina, visti eg alt fyri eitt, at okkurt sermerkt var við henni.

Tá tú letur bókina upp og sær mynstrið innanfyri forsíðuna, kennist tað næstan, sum traðkar man inn í húsini hjá onkrum. Man verður tikin við á Lauru'sa persónligu ævintýraferð, ið gjøgnum frásøgu, dagbókatekst, tekningar og tankar, taka lesaran burturfrá Føroyum til onnur lond. Ja, man fer beinleiðis at droyma seg burtur og ynskja at svimja í kalda, brúsandi føroyska sjónum, at verða partur av einum sirkusi, at sleppa at sova í einum toki við tónleiki frá Tom Waits í oyrunum, at eiga eini lítil summarhús í Lamba og at fara á granskingarferð sum detektivur. Og so havi eg heldur ikki sagt óv nógv.

Kjarr er ein bók, ið á onkran hátt kann taka øll ung (og vaksin) í hondina og hála tey burtur úr veruleikanum eina løtu. Sum ein pausuknøttur, ið kann gera matarsteðgin, kvøldarløtur og busstúrar til ein aktióndreym.

Eg setti mær fyri, at eg kundi lesa eini tíggju síður um dagin, men áðrenn eg visti av, var eg á síðu 183 eftir fýra dagar.

Hetta hevur verið heimurin, ið eg gleðiliga havi reikað til, so ofta eg kundi. Og hetta eri eg vís í, at flest øll onnur eisini høvdu gjørt, um tey ognaðu sær bókina.

Bókin er løtt og stuttlig at lesa, við persónligum dagbókateksti, spennandi tekningum, gátuførum niðurskrivaðum tankum, vegleiðandi myndum og áhugaverdari frásøgn.

Rakel hevur altíð dugað at brúka framúrskarandi frásøgu- og lýsingarhættir, og hetta skarar enn einaferð burturúr, í hesi bókini.

Eitt, ið hon er serliga góð til, er at fanga lesaran. At skapa persónar, ið man næstan fær hug at leita eftir, tá man er liðugur við bøkurnar, tí at man fær seg ikki at trúgva, at hesir persónarnir bert eru skaptir í høvdinum á henni. Og á onkran løgnan hátt, dugir hon eisini at fáa persónarnir at liva víðari í høvdinum á lesaranum.

Tí eftir at hava lisið hesa bókina, fari eg helst í langa tíð at hugsa um, hvat mundi blivið av Lauru og øllum hinum. Hvat gjørdu tey fimtan ár eftir? Fekk Barbara tað nakrantíð betur?

Og støðini eisini, man har vera eitt veruligt Sirkus Kaléidoscope?

Tá lisið verður, kennur man, at man er til staðar, har søgan fyrigongur. Hetta, tí at lýsingarnar eru so nágreiniligar. Eg dugi ikki nóg væl at greiða frá, júst hvussu umfevnandi og næstan gandakendar hesar lýsingarnar eru, so eg havi valt tvey brot burtur úr bókini at lesa fyri tykkum.

Fyrsta brotið stendur á síðu 154 og byrjar á fjórðu reglu:

Amsterdam! Paris! Fantastiskt, ræðandi og vilt, og hon elskaði tað. Elskaði smáu gøturnar við høgum húsum báðumegin, fólk, sum bóru seg øðrvísi at, sum vóru heit og tosaðu hart og onki skiltu av tí, hon segði, og sum ikki kendu hana.

Hon tordi knappliga at royna sítt vánaliga franska, og onki leggja í at gera okkurt býtt. Ongin fór nakrantíð at síggja hana aftur.

Hon kundi balansera á springvatnskantum, hoppa við samlaðum beinum oman trappurnar á Sacre Coeur, og flenna hart av gleði, bara tí alt var so vakurt og frælst. Ongin legði nakað í tað, og ongin hugdi spottandi at henni. Hon hevði sæð bilsin andlit, bilsin og smílandi, ikki fordømandi.

Hon brúkti av sínum fáu pengum til ein karuselltúr í tí ótrúligu karusellini undir Montmartre og keypti eitt baguette og nartlaði av tí, meðan hon gekk, hóast hon ikki sá eitt einasta menniskja eta í gøtunum, sum øll gjørdu í Keypmannahavn.

Hetta næsta brotið stendur á síðu 204 og byrjar á fyrstu reglu:

Tað var løgið at ganga í eini franskari bygd mitt á nátt.

Alt var kvirt, bara onkur hundur goyði onkrastaðni. Ongi ljós komu úr húsunum, tí vindeygalúkur vóru fyri allastaðni.

Langt var millum gøtulyktirnar, ella tað var langt millum tær, ljós var í. Tað var líkt til, at onnurhvør var sløkt. Kanska sløknaðu tær aftan á midnátt? Tað hevði ikki kenst so myrkt, tá tey gingu heim.

Myrkrið gjørdi henni ikki mun, hon neyt tað. Kendi, hvussu tað ballaði seg um hana. Hon hevði góða náttarsjón, so hon sá altíð onnur, áðrenn tey sóu hana. Soleiðis hevði hon altíð havt tað.

Myrkrið fjaldi hana fyri verðini, og hini vóru ikki fjald fyri henni.

Ótrúligt hvussu man sær alt fyri sær, ha?

Hetta, at man sær alt so týðiliga fyri sær, ger eisini, at tað kennist, sum man er til staðar allatíð. Og hetta kann bæði verða frálíkt og hugnaligt, tá man kennir hitan frá fronsku sólini, salta angan av miðjarahavinum og hjartaliga láturin frá sirkusfólkinum, men eisini fullkomiliga ótespiligt, óhugnaligt og beinrakið, tá man verður drigin inn í kaldar nætur við høgum fepri, langar gongutúrar við uppbløðraðum fótum, og tá tað verður sagt frá um, hvussu Barbara, mamma Lauru, uppførur seg.

Hetta er av tí sama ein bók, ið man hevur ringt við at sleppa. Man verður drigin inn í ferðina hjá Lauru, lærir hana at kenna heilt persónliga, kennir hennara tankar og fær frágreitt hvørja einastu rørslu hon fremur, heilt, heilt nágreiniliga.

Eitt, ið eisini spælir ein stóran leiklut í frásøguni er, at tá ið man byrjar at lesa bókina, hevur man veruliga ongan møguleika at vita, hvussu hon endar. Tað ber ikki til at gita seg fram, sum tað ofta ger í ungdómsbókum, tí har eru so nógvar ymiskar hendingar, ið spæla inn. Hon líkist ikki nakrari aðrari bók, eg havi lisið, og einki er, sum man heldur, men samtundis so er alt beint har framman fyri nøsini á tær allatíð.

Tá eg var liðug at lesa bókina, sat eg eftir við eini løgnari kenslu. Einari blanding av, at bara lesa bókina umaftur, og at fara oman í Gamla Bókahandil at leita eftir onkrum øðrum, ið Rakel hevur skrivað, tí at man fer at munga eftir onkrum at lesa, ið hevur sama dám yvir sær.

Hetta hevur verið ein heilt ótrúlig ferð at sleppa á, í hesum køldu og gráu heystarløtunum, og eg kann næstan lova tykkum, at hetta er ikki seinasta ferðin eg lesi Kjarr.

Hetta er heilt víst ein bók, ið eg kann og fari at viðmæla vinfólki, og øllum, ið hava brúk fyri at sleppa á eina ævintýrliga, spennandi, ræðandi og eydnusama ferð bæði í Føroyum og í útlandinum. Øllum, ið vilja sleppa á vitjan sum flugan á vegginum heima hjá spennandi fólki. Øllum, ið vilja forvitnast aftanfyri manesjurnar í heili tveimum sirkusum, kenna, hvussu støðan er í privata heiminum hjá einum rúsdrekkamisnýtara og uppliva at vera í einum spennandi, friðarligum summarhúsum, har tú fær frið at baksast við eitt heimagjørt myrkarúm og at svimja í villa føroyska sjónum, tá tær lystir.

Rakel hevur megnað at flætta alt hetta saman í eina heilt serliga bók, ið eg eri vís í fer at røkka ótalligum fólkum, ið kunnu kenna seg sjálvi aftur í bókini, á onkran hátt.

Hjartaliga tillukku við útgávuni, Rakel.

Takk fyri meg.